# 2000 árgangurin roykfríur

## Spurningar um royking juni 2013

## Spurningarnir vórðu svarðir ónavngivnir

Við í kanningini vóru 488 út av 770 næmingum í 7. flokki í øllum landinum. Nakrir vóru ikki við, og onkur stórur skúli valdi ikki at vera við í kanningini, tá eru longu 50 næmingar, sum fara burtur av. Tey sum svarað hava, eru fyri størsta partin heilir flokkar, so tað er ikki soleiðis, at nøkur velja ikki at svara, tí at tey roykja. Prosentvís skuldi hetta verið umboðandi fyri støðuna í 7. Flokki runt landið.

**Roykir tú?** –

Her vóru fýra svarmøguleikar:

Ja, dagliga

Ja, men ikki hvønn dag

Nei, men havi roykt fyrr

Nei, havi ongantíð roykt

Eingin stabbi er fyri fyrsta svarið, hetta av teirri grund, at eingin var, sum roykti dagliga. Tað var ein út av 488 næmingum, ið segði seg roykja, men ikki hvønn dag.

Fyri tey flestu av teimum 32, ið søgdu seg hava roykt fyrr, var henda viðmerking, at tey høvdu roykt á nýggjárinum, hetta í sambandi við at festa í fýrverk. Skemtiliga kann sigast, at hesi hava lagt av sama dag, tey vóru byrjað og eftir øllum at døma, vildu endurtikið tað sama árið eftir, so hesi 32 av 488 kunnu valla kallast roykjarar.

# 2000 árgangurin roykfríur




Av hesum kann henda niðurstøða gerast, at 0,2% av næmingunum í núverandi 7. Flokki roykja, men ikki hvønn dag. Tað er so okkara vón, at hetta fer at standa við.

## Ert tú saman við fólki, sum roykja?

Fýra svarmøguleikar:

Ja, nógv - Nei, næstan ikki - Ja, ein part av degnum - Nei, ongantíð



# 2000 árgangurin roykfríur

Spurt varð millum næmingarnar: “Ert tú saman við fólki, sum roykja?”. Tey, sum svaraðu ongantíð og næstan ikki, eru 354 av 488. Tað eru færri og færri, sum roykja innanandurða. Hetta er ivaleyst orsøkin til, at stabbarnir ongantíð og næstan ikki, eru hampuliga høgir. Tað er tíðiligt, at gongdin er meiri og meir, at ikki verður roykt innandura.

Talið á teimum næmingum, sum eru saman við fólki, sum roykja og svara spurninginum: “Ja, nógv” er niðanfyri 10%. Hetta hevði ikki verið fyri bert fáum árum síðan. Tey sum siga seg vera saman við fólki, sum roykja “Ein part av degnum” eru 17%. Málið er sjálvsagt, at ung fólk sum hesi, ið ganga í 7. Flokki, áttu heilt at sloppið frá passivari royking. Gongdin er tó rætta vegin, krøvini til roykjarar eru størri nú, enn tey hava verið – so tað glottar fyri framman, vit fara eftir hondin at síggja fram um nøsina fyri royki.



# 2000 árgangurin roykfríur

## Hvørja ávirkan hevur roykur á teg?




Eini hundrað hugsa um heilsuvandan, hesi kunnu til dømis vera bangin um foreldrini, um tey roykja, og hvørjar avleiðingar, tað kann hava. Lukturin tykist at vera tað, sum hesi í 7. Flokki hugsa mest um og eru ávirkað av, tað vóru fleiri enn 300, ið svaraðu ja til henda spurning. Eini tveyhundrað siga seg hosta, tá tey eru undir ávirkan av royki. Tað sigur, at tað enn mong, sum eru útsett fyri passivum royki.

## Roykir nakar heima?



# 2000 árgangurin roykfríur

Her er so nøkurlunda javnt ímillum ja og nei. Niðanfyri er ein útgreining av, hvør tað er, sum roykir heima og hvussu býtið ímillum hesi er.




Sum sæst her, so roykir mamma meira enn pápi. Tá tað kemur til systkin, so eru beiggjarnir raskari at roykja, enn systrarnar. Onnur sum roykja eru øll onnur, sum kunnu vera tey, sum búgva har, ein pápabeiggi ella ein abbi og so framvegis. Minni enn ein triðingur av foreldrunum roykja, mamma 24% og pápi 22%, hetta liggur eitt sindur lægri, enn seinastu tølini fyri, hvussu nógv tey vaksnu roykja í Føroyum.

**Framtíðarútlitini**

Stórar ætlanir eru við 2000-árganginum, sum er roykfríur og skal halda fram við at vera tað. Fólkaheilsuráðið er úti í hvørjum króki í landinum, har ráðið hevur sítt læraraumboð í næstan øllum skúlum í landinum. Tað er hugaligt at hoyra frá teimum, sum arbeiða við børnum, at næstan eingin teirra roykir longur. Hava avmarkingarnar í roykimøguleikum gjørt, at minkingin er so markant, at hetta longu byrjar at virka á ungdómin, tá hugsað verður um tey 15 ára gomlu, so er nógv vunnið, og tað er at gleðast um. Kemur fyrst ferð á, og vit varðveita hesa gongdina, ja so er einki óført.

Hesin árgangur er longu sendifólk fyri sakina. Tey skulu vera fyrimyndin hjá teimum yngru flokkunum, sum koma eftir tey, samstundis sum tey skulu halda tey, ið eru eldri enn tey sjálvi, í ábyrgd fyri somu søk, bæði børn og vaksin.

# 2000 árgangurin roykfríur

**2015 Visjónin**

ESPAD kanningin, sum er fjórðahvørt ár fer í 2015 at raka júst henda 2000-árgangin. Hon sá ikki "for pen út" í 2011, har víst varð á, at av okkara 15 ára gomlu eru 18,7%, sum roykja. Tó, kanningin, vit júst nú hava gjørt, gevur okkum vón um bata innanfyri tvey ár. Um vit fáa hildið 2000-árganginum til, so eru vit komin niðurum 5%, har Ísland liggur, sum eitt av teim bestu londunum á okkara leiðum. Tað verður spennandi at síggja ESPAD kanningina í 2015. Verður tað her, at Visjón 2015 fer at røkka sínum máli, hvør veit.

ESPAD - European School Survey Project on Alcohol and Other Drugs – verður gjørd av Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu. 35 lond í Evropa eru við í hesum kanningar-samstarvinum.

**Vinnarin varð funnin í Fuglafirði**

Útvið 500 næmingar í 7. flokki hava verið við í kappingini um ein ipod, og tað var Hjørdis á Dalbø Gregersen sum var hepni vinnarin. Vit vóru í beint fyri jól í Skúlanum í Fuglafirði, hetta var júst eftir, at tey vóru komin aftur frá jólagudstænastuni, at allir næmingarnir í 7. flokki fingu hvør sína t-shirt við áskriftini "Árgangur 2000 - roykfríur". Eisini var 2. og 3. virðisløn latin tveimum næmingum, hetta var ein bók við ævintýrum.

Næmingarnir í 7. flokki kring landið hava verið við i eini kanning viðvíkjandi royking, úrslitini sum verða á heimasíðuni næstu dagarnar benda á, at einki verður roykt í hesum aldurbólki. Tað var í Visjón 2015, at Landsstýrismaðurin setti sær hetta mál, at allur 2000-árgangurin skal vera roykfríur. Hetta er eitt av økjunum, vit hava arbeitt við í ár og fara at halda fram komandi vár.

2000 árgangurin roykfríur



# 2000 árgangurin roykfríur



# 2000 árgangurin roykfríur

